gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

### Kapping – men bara til eitt vist

Føroyingar kunnu nú aftur gleða seg til at fáa nakrar bíligar ferðaseðlar í summar við flogfari millim Føroyar og Keypmannahavn. 2000 krónur aftur og fram er prísurin, ella næstan helvtarmunur. Tað er gleðiligt, hóast tilboðið kemur seint, og hóast ferðaseðlatalið er avmarkað fyri hvønn túr sær.

Men føroyingar kunnu ikki takka landsstýrinum fyri teir bíligu ferðaseðlarnar, tí landsstýrið gekk ikki ynskinum hjá Mærsk Air á møti um tilboðið á Føroyarutuni í summar.

Eingin grund er almannakunngjørd enn, men tað kann hugsast, at Vinnumálastýrið hevur sagt nei, tí Vinnumálastýrið eigur partabrøvini í Atlantic Airways. Ein kapping á Føroya rutuni merkir eisini, at Atlantsflog fær minni í kassan, tí føroyska flogfelagið má sjálvandi fylgja við. Við øðrum orðum eru grundgevingarnar helst protektionistiskar.

Hinvegin fekk Mærsk Air tilsøgn frá danska ferðslumálastýrinum at hava hetta tilboðið á Føroyarutuni nú í háársstíð fyri fyrstu ferð. Og tað er helst fyrstuferð, at ferðslumálastýrið er gingið ímóti landsstýrinum, tá tað hevur snúð seg um prísir á ferðaseðlum.

Prísurin á ferðaseðlum veldst um hvør kapping er á rutuni. Vit vita, at soleingi Mærsk Air var einsamalt vóru prísirnir lutfalsliga høgir, og eingin serlig tilboð vóru á Føroyarutuni, men kappingin frá Atlantsflog hevur heilt givið elvt til, at prísirnir eru so lágir, sum teir nú einaferð eru. Tí má føroyska flogfelagið eisini verjast.

Men tá tað er sagt, skal leggjast afturat, at tað er ikki í tráð við liberalistiskan, borgarligan politikk at nokta kapping og nokta tilboðum. Henda samgongan hevur annars lagt doyðin á at libealisera fyri at fáa kapping, í hvussu er í orð, men tá tað kemur til stykkis er kappingin sjálvandi avmarkað. At nokta kapping og tilboð var tí í andsøgn til liberalistiska grundarlagið hjá landsstýrinum.

Men samstundis sum tann liberali landsstýrismaðurin noktaði kapping, gav tann sosialdemokratiski ferðslumálaráðharrin tilsøgn til tilboð og økta kapping til frama fyri borgaran, sum annars plagar at vera slagorð Fólkafloksins…

**Sosialurin**

# Brot og bitar



MENTAN

*Havnar Sjónleikarfelag*

Havnar Sjónleikarfelag fer í næstum undir nøkur mentanarkvøld, ætlað bæði ferðafólki og føroyingum.

Høvi verður, saman við einum frásøgufólki, at vitja Sjónleikarhúsið og Hans Andreassar Hús. Síðani verður borðreitt við føroyskum bitum, og kvøldið endar við eini løtu, har føroyskur skaldskapur verður borin fram á palli.

Tiltøkini verða sunnukvøld og mánakvøld kl. 20.00.

Atgongumerki à kr. 150,- eru at fáa á Kunningarstovuni og í Sjónleikarhúsinum 1 tíma undan sýning.

# Nýggj ferðavinnufyritøka

FERÐAVINNA

*Tíðindaskriv*

Nýggj ferðavinnufyritøka, P/F GreenGate Incoming, er sett á stovn. Tað eru tey bæði ferðavinnufólkini Marni Hjallnafoss og Fríðun Hansen, sum hava stovna fyritøkuna.

Sum tað liggur í navninum »Incoming«, so skal felagið serliga taka sær av at fyriskipa uppihald hjá ferðandi í Føroyum.

Streymurin av útlendskum ferðafólki til Føroya er í støðugari menning og krøvini til fyriskipan av ferðum og upplivingum, meðan ferðafólkini eru í Føroyum vaksa eisini. Og tað er júst hetta felagið GreenGate leggur serligan dent á.

GreenGate fer bæði at leggja seg eftir fyriskiping av ferðum hjá einstøkum ferðandi – sokallaðir pakkatúrar – og at fyriskipa uppihald hjá størri ferðaløgum, sum eitt nú skulu hava fundir, ráðstevnir ella líknandi tiltøk í Føroyum.

Marni og Fríðun hava bæði drúgvar royndir innan hetta øki frá størvum innan føroysku ferðavinnuna. Tey halda at tíðin nú er búgvin til at skipa eina fyritøku, sum spesialiserar seg innan incoming og vóna at hendan fyritøkan kann stuðla uppaftur meiri uppundir menning av føroyskari ferðavinnu.

Felagið fer at bjóða sínar tænastur til bæði føroyskar og útlendskar ferðavinnufyritøkur, sum tørva samstarvsfelaga at fyriskipa móttøkuna í Føroyum, men stovnarnarnir báðir staðfesta eisini, at grundarlagið fyri einari hepnari gongd er eitt gott samstarv við veitarar av ferðavinnutænastum í Føroyumog flutningsfeløg.

Millum feløgini, sum Greengate vónar at fáa gott samstarv við er Atlantic Airways, sum seinastu árini hevur gjørt nógv burturúr marknaðarføring av pakkaferðum til Føroya úr Norðurlondum, Stóra Bretlandi, Týsklandi og Fraklandi.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9




## Lærarar til Tvøroyrar skúla

Søkt verður eftir lærarum til tíðaravmarkað størv fyri skúlaárið 2001/2002.

1 møguliga 2 lærarar fyri lærarar í farloyvi
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar fyri lærarar við niðursettari tíð.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1. til 27.4.

Fyrispurningar um størvini kunnu setast skúlastjóranum tlf. 371582.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi tórsdagin 12. juli kl. 16.00.

**Tvøroyrar Skúlanevnd**
v/ Bergur Stórhamar
826 Trongisvágur

Allir prentlutir í góðum hondum hjá
Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo



KVASIR

## 9 ymiskir møguleikar at ganga til teldukoyrikort á KVASIR

2. árshálvu 2001 bjóðar skeiðstovan KVASIR ikki færri enn 9 ymiskar skeiðmøguleikar innan grund- og víðkað teldukoyrikort-skeið.

Umframt hetta veita vit serloysnir til bólkar, feløg, virkir og stovnar.

**Teldukoyrikortið**

| | byrjar |
|---|---|
| Mánadag fyrrapart | 20. aug |
| Mánakvøld | 20. aug |
| Týskvøld | 2. okt |
| Mikudag seinnapart | 31. okt |
| Mikukvøld | 12. sep |
| Hóskvøld | 25. okt |

**Stóra teldukoyrikortið**

| | byrjar |
|---|---|
| Mánakvøld | 20. aug |
| Mikudag fyrrapart | 5. sep |
| Mikudag seinnapart | 22. aug |

SKEIÐSTOVAN KVASIR
FARODANE
TLF 320204
http://kvasir.farodane.fo

FARODANE 07-01

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 16. juli til 6. august.

i Sosialurin

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Sosialurin - 311820



Rætti bilurin til mong endamál. Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Nú ber til at skráseta seg í FOIR — veitaraskránna í oljuhøpi

Oljuvinnufelagið hevur saman við oljuoperatørunum í føroyska økinum gjørt eina veitaraskrá nevnd FOIR (Faroe Oil Industry Register.)

Øll føroysk virkir, sum hava áhuga í oljuvinnuni, kunnu skráseta seg í FOIR. Við at skráseta seg í FOIR, verður virkið meira sjónligt fyri oljufeløgini og undirveitarnar á føroyska økinum. Virkið sær eisini, við at skráseta seg í FOIR, hvørji útboð omanfyri 100.000 krónur oljufeløgini og teirra undirveitarar hava á føroyskum øki, umframt at virkið sær hvør fær sáttmálarnar.

Nú er møguligt at skráseta seg í FOIR. Tit kunnu skráseta tykkum annað hvørt við at venda tykkum til Vinnuhúsið (tlf 311864, e-mail industry@industry.fo), ella við at fara inn á heimasíðuna www.foir.fo. Kostanaðurin fyri at skráseta seg er 3.125 íroknað MVG.

**Oljuvinnufelagið**

veitst tú ikki tað? Sosialurin

## Heilsuhjálparafelag Føroya

Skrivstovan er stongd vegna summarferiu frá mánadegi 9. juli, opið verður aftur mánadagin tann 30. juli.

**Nevndin**

## NetCafé Orion

Í sambandi við at NetCafé Orion møguliga fer at keypa nýggjar teldur, verða núverandi teldur seldar fyri spott prísir.

Talan er um 12 teldur, sum verða seldar fyri 7.000,- pr. stk, skunda tær og ring um tú ætlar at ogna tær eina teldu fyri hendan spott prís.

**NetCafé Orion**
Tlf. 216676

Sosialurin -tað loysir seg